**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Standard hydrografi. Túrur nr. 1402**
**Tíðarskeið 12/2-19/2-2014**

---

**Fólk frá Havstovuni:** Regin Kristiansen, Poul Vestergaard og Inga Kristiansen 12-14/2 og 16-19/2

**Ábyrgd:** Karin Margretha H. Larsen

**Endamál:** Endamálið við túrinum er at fylgja við broytingunum í havinum kring Føroyar. Túrurin er ein partur av teimum regluligu kanningunum eftir standardskurðunum, og er partur av NACLIM verkætlanini. Eisini skuldi Inga taka royndir av djóraæti á nøkrum støðum á skurði N.

**Reiðskapur:** Seabird-CTD við rosettu, WP2 glúpur og Multi-net.

**Um túrin:** Vit fóru út mikudagin 12/2 kl. 2230. Siglt varð vesturum, har vit byrjaðu at taka standardskurð V út á Føroyabanka.
Av Føroyabanka varð siglt norður á skurð R, vestur úr Mykinesi. Tá vit komu á næstu støð á hesum skurðinum fingu vit tekniskar trupulleikar, so vit máttu inn á Havnina fyri at fáa hetta í rættlag aftur. Tá fór Inga í land.

Vit fóru av Havnini aftur 14/2 kl. 1115.
Tá sigldu vit suður á Munkagrunnin, har vit tóku skurð Z suður eftir Munkagrunninum. Vit tóku støðirnar S1-Z19.
Haðani sigldu vit eystur á skurð S. Har vit byrjaðu við støð S10 og tóku so hendan skurðin ímóti Munkagrunninum, inn á støð S1. Tó var støð S9 ikki tikin, tí at ein boripallur var komin beint á hesa position.
Av Munkagrunninum varð siglt norður á Havnina, har Inga kom umborð. Vit sigldu so eystur á støð N1 og tóku skurð N norðureftir, norður á N14.
Á støðunum N4, N5, N13 og N14 varð Multinetið brúkt.

**Prøvataking:** Við Seabird CTD-ini tóku vit 68 støðir. Multinetið og WP2 glúp á fýra støðum.
Á støðunum V6, S8, N4, N5, N13 og N14 vóru prøvar tiknir av tøðsøltum og plantuæti.
Á støðunum N7 og V6 vóru prøvar tiknir til goymslu.
Á støðunum V6, N5 og N14 vóru prøvar tiknir til kanning av havsúrgan.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Saltprøvarnir verða analyseraðir í vár.

**Viðmerkingar:** Á skurði Z og S vóru støðir eisini tiknar í bretskum sjógvi. Tíð var ikki at taka skurð E, M og R.

26-02-2014

Regin Kristiansen




Kósir og støðir á túri 1402